# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein skomm fyri demokrati'ið

Rætturin hevur nú talað. Mvg av skrásetingargjaldi á bilum var tikið inn uttan heimild í fleiri ár.

Hesa niðurstøðu kom skattakærunevndin til fyri fleiri árum síðani, langt áðrenn nakað fyrningsstos. Fíggjarmálaráðið burdi havt útgoldið ov nógv kravda mvg'ið aftur longu tá.

Tað er ein forkastilig skipan, sum noyðir Palliba í rættin, heldur enn at virða eina kærunevnd, sum júst er til, fyri at Palliba ikki skal noyðast í rættin. Ein kærunevnd, sum er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki, men sum Taks kortini noktar at fylgja. Eisini hóast sama kærunevnd hevur staðfest, at avgerðir hjá nevndini skulu fylgjast, og at Taks ikki kann bíða við at at viðgera mál, vísandi til at Taks er ósamt í niðurstøðuni og tí hevur kært mál til hægri dómstól.

Er tað stjórin á Taks, sum ikki virðir tær lógir, sum hann er settur at umsita? Ella aktar stjórin bara harraboðum úr erva? Vit spyrja, tí tað má og skal fáa avleiðingar, tá demokratisku spælireglurnar ikki verða virdar av teirri umsiting, sum skal umsita somu reglur.

Tað er alt ov møtumikið hjá einum meinigum borgara at noyðast at stevna skattavaldinum, og Fíggjarmálaráðið er væl vitandi um, at bert eitt fátal av borgarum hava orku til at fara í rættin við kravinum.

Og við at toga málið somikið langt út, at tað nú bert er eitt fátal av handlum, sum ikki eru falnir fyri fyrningarfrestini, hava Taks og Fíggjarmálaráðið gjørt ilt verri.

At halda Palliba og Marsannu til rukku við at pábe-rópa sær fyrning, er púra burturvið. Fíggjarmálaráðið veit, at peningur er innkravdur, uttan at heimildin hevur verið í lagi, og um ikki hevur pening, sum man veit er tikin inn uttan heimild, so er heldur eingin heimild at brúka hann, óansæð hvussu leingi peningurin hevur ligið.

Fyriuttan tað moralskt forkastiliga í einum slíkum hugburði hjá teimum, ið skuldu verið fólksins tænarar, so er eisini tað at siga, at Fíggjarmálaráðharrin sjálvsagt onga heimild hevur at behalda hesa peningin. Tað kann ikki koma upp á tal, at landið beheldur pening, sum tað veit eru innkravdir av óróttum, óansæð um talan er um fimm ár ella ikki.

Landið hevur ikki loyvi at búka peining, sum tað veit er fingin til vega í heimildarloysi, og tí er einki annað hjá Eidesgaard at gera, enn at gjalda út við kassa eitt!

Tað finst eitt gott føroyskt orð fyri tað, at taka pening frá øðrum uttan heimild ella loyvi.

**Sosialurin**

## Fólkatilfeingið í Føroyum má gagnnýtast betur

**ANNIKA OLSEN**
landsstýriskvinna í innlendismálum



Tað hevur verið nógv tosað um týdningin av at fáa føroyingar heim aftur til Føroyar, føroyingar, ið hava tikið útbúgving uttanlands og annars hava vunnið sær royndir eru virðismikið tilfeingi fyri føroyska samfelagið. Hetta má og skal vera eitt tað fremsta áhugamálið hjá føroyskum politikarum í 2010, tí fólkavøkstur skapar búskaparvøkstur.

Men í øllum tosinum um at fáa føroyingar heim aftur á klettarnar, hava vit lyndi til at gloyma tað fólkatilfeingið, íð vit hava í Føroyum. Føroyingar duga væl at gagnnýta fisk, seyð og annað tilfeingi, men vit eru ikki serliga dugnalig til at røkta og gagnnýta tað fólkatilfeingið, sum í Føroyum býr, bæði tá tað snýr seg um føroyingar í Føroyum og teir útlendingar, ið her búleikast. Vit hava umleið 1200 útlendingar í Føroyum, útlendingar, ið eru komnir higar í arbeiðsørindum og onnur, sum hava fingið sær føroyskan maka v.m. Nógv av hesum fólkum hava holla útbúgving ella eru dugnalig í aðrar mátar. Hesi fólkini, kvinnur sum menn, eiga at fáa ein veruligan møguleika á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Fyri jól las eg áhugaverda tíðargrein eftir Páll Holm Johannesen, "Kvinnunar vit gloyma". Greinin var nokk so sigandi, har m.a. varð greitt frá einari kvinnu, sum í heimlandinum átti at vera advokatur, men í Føroyum arbeiddi hon í fiski. Tað eru óivað nógv tílík dømi sum hetta, har útlendingar, kanska serliga útlendskar kvinnur, ið hava fingið sær maka í Føroyum, ikki fáa møguleika til at brúka sína útbúgving og førleikar fult út. Sum samfelag, við avmarkaðum fólkatilfeingi og avmarkaðum fakligum tilfeingi hava vit ikki ráð til at kasta hesar førleikar fyri borð.

**Integratión er eitt must**

Ein fyrsta treyt fyri, at útlendingar skulu kenna seg væl í føroyska samfelagnum og tora at bjóða seg fram við sínum førleikum og royndum er ein vælskipað integration. Hetta orðið hevur verið rættiliga fjarskotið í føroyskum politikki, møguliga skyldast tað, at vit ikki hava havt fult ræði á útlendingaøkinum, men avgjørt ikki nøkur góð grundgeving fyri, at onki er gjørt. Útlendingar, ið koma higar, hava ógvuliga trupult við at finna seg til rættis ta fyrstu tíðina. Tey skilja ikki málið, nøkur av teimum hava enntá sera trupult við enskt. Vit eiga at duga betur at taka móti hesum fólkum, ið ynskja at seta búgv í Føroyum. Eitt uppskot hevði verið at givið hesum fólkum ein "byrjunarpakka", eina mappu við øllum hentum upplýsingum um grundleggjandi viðurskifti í føroyska samfelagnum, og um hvar man skal venda sær við ymsum spurningum og trupulleikum. Somuleiðis eigur heimasíðan hjá útlendingastovuni at útbyggjast, soleiðis at tilfar og skjøl eru tøk á fleri fremmandum málum.

Í heyst undirskrivaði undirritaða felagslýsing saman við danska integratiónsmálaráðharranum, Birthe Rønn Hornbech, um yvirtøku á útlendingaøkinum. Hendan yvirlýsing sigur, at útlendingaøkið skal yvirtakast í seinasta lagi 1. jan. 2011. Í tí sambandi avgjørdi eg, at orðast skuldi ein integrationspolitikkur, sum ítøkiliga skal innihalda, hvussu vit skulu handfara útlendingar, ið koma til Føroyar. Arbeiðssetningur er orðaður, og arbeiðsbólkur verður settur fyrsta dagin. Miðað verður eftir, at arbeiðsbólkurin skal verða liðugur við arbeiðið 1. okt. 2010. Ein væleydnað integratión er m.a. at útlendingar skilja og duga at tosa føroyskt. Hetta er ein grundleggjandi fyritreyt fyri, at útlendingar kunnu kenna síni rættindi og skyldur í Føroyum. Nógvir útlendingar hava trupult við at koma framat føroyska arbeiðsmarknaðinum, tí føroyska málið er ein forðan - hetta er ikki gott nokk. Føroyska málið er somuleiðis ein fyritreyt fyri at kenna til føroyska mentan, føroyskan politikk, føroyska rættarskipan, skattaskipan o.s.fr. Hetta eru alt grundleggjandi meginreglur í einum samfelag, sum øll óansæð húðalit og etniskan uppruna hava rætt og skyldu at kenna til.

## Er ikki nóg mikið oyðilagt?

### Yvirlýsing samtykt á álitisfólkafundi hjá Føroya Pedagogfelag 6.jan. 2010

Fíggjarlógin 2010 er samtykt, hetta við so miklari fer, at trupult hevur verið at fingið innlit í hvat og hvussu skerjingarnar koma at ávirka ymisku samfelagsuppgávurnar.

Tó tykist tað, sum um útmeldingin er, at tað skal sparast innan bústovnar og sambýli fyri menniskju, ið bera brek.

Hvussu ber tað til, at spara á einum øki, ið longu er niðurpínt? Støðan á bústovnum og sambýlum fyri menniskju, ið bera brek, er longu, sum nú sera álvarslig. Manglandi raðfesting í fleiri ár hevur verið eyðkenni – og samtykkir Føroya Løgting nú at sparast skal 0,75% í 2010. Stovnarnir hava ikki meira at taka av. Andsøgnin er fullkomin. Føroya Løgting góðkendi ST-sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, so seint sum í summar, men henda skerjing er ikki í trá við henda sáttmála. Vit mugu tí staðiliga heita á avvarðandi myndugleikar um at broyta hesa avgerð. Hetta eru menniskju tað gongur útyvir, og ikki bert nøkur tøl, sum skulu snøggast til.

*Tórshavn, tann 6. jan. 2010*
**Føroya Pedagogfelag**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.